DAGSINS MEINING

Ein sorgarleikur

Tað hevur nú í fleiri ár veriðalkunnugt fyri heimssamfelagnum, at ein ræðuligur sorgarleikur fer fram í landspartinum Darfur í Sudan. Skerpingur og borgarakríggj eru meginorsøkirnar. Fólkið í Darfur er mest kristið fólk av negroidum uppruna. Hinvegin eru sudanska stjórnin og meirilutin av sudanska fólkinum muslimar av arabiskum uppruna. Fólkasløgini í Sudan er førd saman av søguligum tilvildum og mentanarliga hava tey lítið og einki til felags, og muslimski parturin hevur leingi forfylgt teimum kristnu í Darfur.

Tað sum gongur fyri seg í Darfur er ein sorgarleikur. Borgarakríggið hevur fleiri ferð verið mestsum at bera saman við etniska reinskan og hendingar hava verið, ið minna á tað, sum fyri tíggju árum síðan hendi í Ruanda. Her hevur verið talan um beinleiðs tjóðarmorð ella genocide, sum hetta ræðuliga fyribrigdið verður nevnt. Tað, sum hevur eyðkent sorgarleikin í Darfur er, at altjóða samfelagið ikki hevur lyft hond frá síðu til tess at steðga ræðuleikunum í Darfur. ST, ES og akrikanski felagskapurin hava einki gjørt, men sótu í áravís hendur í favn.

Noreg er einasta vestanland, sum hevur roynt at skapa altjóða politiska uppbakking fyri eini ST atgerð í økinum. Fyrr í vár eydnaðist so langt um leingi at fáa Kofi Annan at vitja Darfur, har hann var í fylgi við einum norskum varauttanríkisráðharra. Síðan hevur ST arbeitt viðmálinum við tí fyri eyga at skapa frið og trygd í økinum. Úrslitið gjørdist ikki óvæntað. Í gjár kunngjørdi ST, at sudanska stjórnin skal fáa enn ein møguleika til sjálv at loysa trupulleikarnar í Darfur. Hetta merkir bert eitt, nevniliga at ræðuleikarnir fara at halda fram. Sum ikki einaferð bakka ST og vesturheimuirn fyri arabiskum og muslimskum trýsti

Tað er løgið, at vesturheimurin áhaldandi vísir trupulleikunum í Afrika so stóra líkasælu. Hvør orsøkin til hesa líkasælu enn kann vera, so er henda líkasæla etiskt og politisk tyngjandi fyri vesturheimin. Hvør orsøkin so enn er, so kann hetta ikki halda fram. Tað fer at fella aftur á komandi ættarlið og her má tí vend koma í.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Hugleiðingar av Slættanesi

Tað vekir minni aftur at ganga í túninum, har barnaskógvarnir vórðu tráddir. Minnini kunnu ikki takast frá okkum

Ása Rasmussen

So vóru vit aftur her. Sum tað er gott at seta fótin á Slættanes, her vit slitu okkara barnaskógvar.

Veðrið er frálíkt. Vit standa eina løtu og eygleiða Ólav, sum spakuliga fer frá landi aftur fyri síðan at seta ferð á móti Vestmanna.

So fara vit undir at knossa viðførið niðan úr fjøruni. Her er eitt sindur. Taskur og soviposar fyri ikki at gloyma »lítla gassblussið«, sum er sera hent.

Komnar niðan í túnið skrúva vit stoppikranan frá, lata dyrnar upp og sleppa øllum, vit hava í hondini, meðan vit láta: »Sum her er herligt«.

Nú verður lítla blussið tendrað, og ein ketil hjá Ellu settur út á til kaffi, meðan øskan verður tikin út, og kikað verður í komfýrinum. Skjótt kókar, og kaffilukturin fyllir alt húsið.

Eftir ein góðan munn eru vit klára til ein túr. Men hvar skulu vit fara fyrst? Jú, lat okkum fara at vita, hvussu er við ternunum í ár.

Ganga niðan til Liða - har einki portur er longur. Koma upp á Grøv og tritla spakuliga heimeftir.

Her angar av brobberum og ymiskum gróðri, og skjótt eru vit í ternubølinum.

Hygg. Her liggja eggini. Og so sera tøtt, at tú mást undir Heygnum og somuleiðis øll á Heygnum eru burtur. Úti á Mørkini er eitt eftir. Men við ovara veg eru tey enn, sum vóru.

Komnar oman aftur, liggur leiðin fram við skúlanum. Havi hug at rósa teimum, um hava fingið hann í so góðan stand. Tað er prýði í honum.

Nú eru vit aftur í túninum og fara inn í húsið við Skúlavegin, her vit hava fingið loyvi at gista.

Vit fá okkum ein náttúrðabita og seta okkum við køksvindeygað at hyggja út í summarkvøldið og lata tankarnar reika. Mangt er at minnast aftará, og í morgin fara vit, um Guð vil, út aftur á gamlar gøur. Aftur á slóðina.

Takk Guð. Fyri tíð, sum er at enda, og fyri stundina, sum er.

Innsent tilfar

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Klaksvíkar býráð hartar Pizza Aage

Klaksvíkar býráð metir tilburðin við Pizza Aage verða stak óhepnan, og góðtekur ikki slíkan atburð frá dananum. Borgarstjórin, Steinbjørn Jacobsen, fer nú undir at kanna um, Pizza Aage framvegis sýtir fyri gera mat til týsk og fronsk ferðafólk

PIZZA AAGE
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Kokkurin, Pizza Aage, er komin upp á býráðstig. Mánakvøldið viðgjørdi Klaksvíkar býráð umstrídda kokkin á Pizzaria Napoli í Klaksvík. Limirnir í Klaksvíkar býráð heita staðliga á borgarstjóran, Steinbjørn Jacobsen, um at fylgja málinum gjøllað.

Í eini áheitan til borgarstjóran verður sligið fast, at eitt samt býráð metir tilburðin við Pizza Aage verða stak óhepnan, og býráðið góðtekur ikki slíkan atburð frá dananum.

Fyri góðum mánaði síðan kom undan kavi, at nógv umstríddi Pizza Aage var farin at gera um seg í Føroyum. Hóast hann bæði varð meldaður, ákærdur og dømdur fyri rasudiskrimatión í Danmark, er kokkurin á Pizzaria Napoli ikki at vika. Hann vil ikki slaka fyri síni aðalreglu um, at týskarar og fransmenn ikki hava uppiborið bitan frá sær.

Pizza Aage er viðhaldsmaður av støðuni hjá USA í Irak-kríghum, og hann kann als ikki góðtaka støðuna hjá stjórnunum í Fraklandi og Týsklandi.

Fylgir málinum

Borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu var ikki sjálvur á fundinum mánakvøldið, men týsmorgunin, tá vit fingu orðið á hann, hevði fingið áheitanina frá býráðslimunum.

– Tað næsta, eg fari at gera í málinum, er at kanna um Pizza Aage hevur endurtikið tilburðin(Pizza Aage sýtti fyri at geva nøkrum týskum og fronskum ferðafólki mat, blðm), sigur Steinbjørn Jacobsen.

Spurdur, um ferðavinnan í Klaksvík hevur merkt nøkur keðilig árin av atburðinum hjá Pizza Aage, svarar borgarstjórin, at tað hevur hon als ikki.

Rókur nýggjur sangari í All That Rain

Seinasta telvingin í rockbólkinum All That Rain hevur við sær, at ein av bestu føroysku rocksangarunum, Rókur Jakobsen, skal verða sangari í bólkinum. Fyrsta framførslan verður leygarkvøldið

TÓNLEIKUR
Eyðun Klakstein

Rókur Jakobsen verður nú sangari í All That Rain, og fyrsta uppgávan hjá honum verður á Kambsdali leygarkvøldið

Nú verður Rókur Jakobsen fluttur í front í rockbólkinum All That Rain.

Fyrrverandi sangarin í Tangz skal manna tóma plássið sum sangari í All That Rain, eftir at Pól Arni Holm fór úr bólkinum herfyri.

– Vit høvdu avtalað við Rók, at vit skuldu fara at venja, tá ið hann kom heim til Føroya, men nú leypa vit bara út í tað. Vit hava vant einaferð saman, og leygarkvøldið spæla vit longu fyrstu ferð alment, sigur Henning Nicodemussen, sum er trummuspælari og ein av upprunaligu limunum í bólkinum.

Gittarspælarin Hans Ravnsfjall hevur eisini verið sangari í bólkinum, og tí kann hann stuðla nýggja sangaranum fyrstu tíðina.

– Fyrr hava vit vant við nýggjum sangara í langa tíð, áðrenn vit fóru at spæla alment, men hesaferð fara vit bara í gongd, og so síggja vit eisini skjótari, hvar vit hava hvønn annan, sigur Henning Nicodemussen.

Skift sangara fleiri ferðir

Rockbólkurin All That Rain tók við, har bólkurin Kjølar slepti seint í 90'unum. Tríggir av tónleikarunum í Kjølum hildu fram undir navninum All That Rain, og bólkurin hevur verið virkin síðani. Teir hava verið við í Prix Føroyum, hava givið tónleik út á fløgu, og hava samstundis verið ein tann best umtókti dansi- og konsertbólkurin í landinum.

Onkrir skiftingar eru gjørdar í bólkinum gjøgnum árini. Jens Marni Hansen, sum var gittarspælari og sangari, fór burtur úr, og ístaðinfyri hann koma vágamaðurin Hans Ravnsfjall uppi. Hans var fyrsta skiftið bæði sangari og gittarspælari, men í fjør tók Pól Arni Holm yvir sum sangari. Hansara tíð í All That Rain endaði fyrr í summar, og nú hevur bólkurin funnið nýggjan mann at seta orð til tónleikin.

Spæla longu leygarkvøldið

Rókur Jakobsen kom sum blaðungur fram í bólkinum Lokum, men hann er helst best kendur sum sangari í Tangz, sum gjørdi nógv um seg eitt tíðarskeiði – bæði við útgávu og á konsertum. Rókur hevur eisini verið sangari í MC Hár og var millum annað við bólkinum til Prix Føroyar kappingina í fjør.

Nú hava Rókur og All That Rain funnið saman, og fyrsta framførslan hjá teimum verður longu leygarkvøldið, tá ið All That Rain spælir til dans í ítróttarhøllini á Kambsdali. Bólkurin verður eisini at hoyra í Ólavsøkutjaldinum um tvær vikur.

Manningin í All That Rain er nú hendan: Rókur Jakobsen (sang), Hans Ravnsfjall (gittar), Jens Tummas Ness (bass) og Henning Nicodemussen (trummur).